## Oyggjaleikaliðið venur í Havn

Um vikuskiftið venur svimjilandsliðið í Svimjihøllini í Havn. Venjarar á leguni verða Kristian Martin Joensen og Petur Heðin á Fløtti, og svimjararnir eru Pauli Ø. Mohr, Paula Ø. Mohr og Kári J. á Høvdanum úr Fuglafjarðar Svimjifelag, Bjørg Seloy, Andrass Thomsen og Guðrun H. Jacobsen úr Havnar Svimjifelag, Birita Debes úr FLOT, og Shaila millum Garðarnar, Malan V. Bærendsen, Katharina Lamhauge og Mona Simonsen úr Suðuroyar Svimjifelag. Av hesum venja Kári J. á Høvdanum, Birita Debes og Shaila millum Garðarnar eisini til heimsmeistarastevnuna í Rom, og Pauli Ø. Mohr til europisku juniormeistarastevnuna í Prag. Tey koma at venja fríggjakvøld, leygarmorgun og leygardag, og møtast so aftur til felagsvenjing í Vági, umleið tvær vikur eftir hetta.



## Pauli velur EJM fram um HM

Pauli Øssurson Mohr, ið hevur klárað kravtíðina til allar kappingarnar í summar, Oyggjaleikir, Evropeisk Juniormeistarastevnuna í Prag og Heims Meistarastevnuna í Róm, hevur avgjørt at satsa uppá Oyggjaleikir og Evropeisku Juniormeistarastevnuna. Hetta er ein langsiktað val hjá Paula, og vísir eina sera spennandi langsiktaða ætlan hjá Paula. Pauli hevur í ár sligið metið í 50 frí fleiri ferðir, og spennandi verður at síggja hvussu summarið fer at hilnast honum.



Eftir fyrsta triðingin av Vodafone-kappingini hevur KÍ framvegis ikki vunnið. Rás2 verður á staðnum, tá Klaksvíkingar gera tíggjundu royndina eftir sigrinum

vodafone deildin

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 9 | 7 | - | 1 | - | 1 | 23 | 11 | 12 | 22 |
| 2 Víkingur | 9 | 5 | - | 2 | - | 2 | 20 | 13 | 7 | 17 |
| 3 NSÍ | 9 | 5 | - | 2 | - | 2 | 19 | 14 | 5 | 17 |
| 4 B68 | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 15 | 15 | 0 | 14 |
| 5 EB/S | 9 | 3 | - | 4 | - | 2 | 13 | 9 | 4 | 13 |
| 6 AB | 9 | 3 | - | 2 | - | 4 | 9 | 12 | -3 | 11 |
| 7 B36 | 9 | 3 | - | 2 | - | 4 | 13 | 17 | -4 | 11 |
| 8 ÍF | 9 | 2 | - | 2 | - | 5 | 10 | 16 | -6 | 8 |
| 9 07 Vestur | 9 | 1 | - | 3 | - | 5 | 16 | 24 | -8 | 6 |
| 10 KÍ | 9 | 0 | - | 4 | - | 5 | 7 | 14 | -7 | 4 |

**Formbarometrið**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 6 | 5 | - | 1 | - | 0 | 18 | 8 | 10 | 16 |
| 2 B68 | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 13 | 9 | 4 | 11 |
| 3 NSÍ | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 12 | 11 | 1 | 10 |
| 4 Víkingur | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 10 | 9 | 1 | 10 |
| 5 ÍF | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 9 | 10 | -1 | 8 |
| 6 AB | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 5 | 8 | -3 | 8 |
| 7 EB/S | 6 | 1 | - | 4 | - | 1 | 8 | 7 | 1 | 7 |
| 8 07 Vestur | 6 | 1 | - | 3 | - | 2 | 12 | 12 | 0 | 6 |
| 9 KÍ | 6 | 0 | - | 2 | - | 4 | 4 | 10 | -6 | 2 |
| 10 B36 | 6 | 0 | - | 2 | - | 4 | 7 | 14 | -7 | 2 |

**1. deild menn**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 FC Hoyvík | 9 | 6 | - | 1 | - | 2 | 14 | 10 | 4 | 19 |
| 2 HB | 9 | 5 | - | 2 | - | 2 | 20 | 11 | 9 | 17 |
| 3 TB | 9 | 5 | - | 2 | - | 2 | 15 | 13 | 2 | 17 |
| 4 B68 | 9 | 5 | - | 1 | - | 3 | 22 | 13 | 9 | 16 |
| 5 B71 | 9 | 5 | - | 1 | - | 3 | 18 | 11 | 7 | 16 |
| 6 VB/S | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 20 | 18 | 2 | 14 |
| 7 NSÍ | 9 | 3 | - | 1 | - | 5 | 14 | 20 | -6 | 10 |
| 8 Skála | 9 | 2 | - | 2 | - | 5 | 9 | 15 | -6 | 8 |
| 9 Víkingur | 9 | 1 | - | 4 | - | 4 | 7 | 10 | -3 | 7 |
| 10 MB | 9 | 0 | - | 2 | - | 7 | 8 | 26 | -18 | 2 |

# Víkingar aftur í Fuglafirði

**Eftir rimma sigurin á grannunum í steypakappingini skal Víkingur hesa ferð spæla úti móti ÍF. Á Toftum hevur oddaliðið trupla uppgávu, og í Klaksvík líkist tað yvirliving, hvørja ferð KÍ spælir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at fyrsti triðingurin er farin aftur um bak í Vodafone-deildini, er stigatalvan so spakuliga við at taka ein meira fastan form.

Annan hvítusunnudagin verður farið undir 10. umfarið í kappingini, og talan tykist vera um eitt umfar, har tað er trupult at fáa eyga á teir heilt stóru favorittarnar.

HB hevur eftir fyrsta partin av kappingini lagt seg væl og virðiliga á odda í kappingini. Skal metast eftir formkurvuni, so er B68 tað av hinum liðunum, sum hevur best møguleika at koppa HB, og á Svangaskarði plagar sjáldan at vera lætt hjá nøkrum liði at fáa nakað við sær heim.

### Eltararnir

Víkingur og NSÍ, sum eru næstu liðini skulu eisini royna seg á útivølli.

Hóast Víkingur vann stórsigur í grannauppgerðini móti ÍF í gjár, so er tað so ofta áður prógvað, at landsog steypakapping er hvør sítt, og tað man heldur ikki vera nakar sum helst ivi um, at fuglfirðingar vilja vaska eyðmýkingina av sær, so skjótt sum teir kunnu sleppa til tað.

Og í Klaksvík – har Rás2 sigur beinleiðis frá dystinum – verður heldur ikki lætt hjá NSÍ. Hóast status sum botnlið, so byrjaði KÍ árið væl við javnleiki í Runavík, so á tann eru runavíkingarnir longu ávaraðir. Hinvegin hevur NSÍ longu snávað fleiri ferðir á heimavølli í ár, meðan teir á útivølli hava vunnið sær fulla úrtøku.

Á Argjum er fótbóltsbarometrið uppgangandi í stórum. Undan dystinum um vikuskiftið hevur AB málmunin á B36, og nú er málið at leggja ein av stórubeiggjunum í høvuðsstaðnum ordiliga aftur um seg.

Seinasti dysturin er í Sørvági, har EB/Streymur kemur á vitjan. Føroyameistararir hava spælt dekan ov nógvar og dýrar javnleikir fyrsta triðingin av kappingini, og tí er eingin sum helst ivi um, at teir mugu fara eftir øllum stigunum mánadagin.

## Dystaryvirlit

**Vodafone-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 01.06 | B68-HB | Petur Reinert |
| 01.06 | AB-B36 | Eiler Rasmussen |
| 01.06 | KÍ-NSÍ | Ransin N. Djurhuus |
| 01.06 | 07 Vestur-EB/S | Bárður Mortensen |
| 01.06 | ÍF-Víkingur | Rúni Gaardbo |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 30.05 | NSÍ-TB | Rúni Gaardbo |
| 30.05 | HB-Skála | Høgni Hansen |
| 30.05 | B68-B71 | Andrew Christiansen |
| 30.05 | FC Hoyvík-Víkingur | Birgir Sondum |
| 30.05 | MB-VB/S | Rói Jacobsen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 01.06 | B36-KÍ | Jóhan Petur Michelsen |
| 01.06 | B71-ÍF | Allan Manai |
| 01.06 | EB/S-Víkingur | J.M. Kjell |
| 01.06 | 07 Vestur-Undri | Pætur Albinus |
| 02.06 | AB-AB | Birgir Joensen |

**Kvinnur, steypakapping**

| | | |
|---|---|---|
| 01.06 | 07 Vestur/MB-AB | Elsa Andreasne |
| 01.06 | KÍ-Víkingur | Verner Hentzer |